## Taptu ímóti dønum

Einki stig og einki mál. Tað er úrtøkan hjá føroyska U17 landsliðnum, sum í gjár spældi seinna dystin í NM-kappingini. Mótstøðuliðið var Danmark, sum, sambært heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum, er væl sterkari enn skotar – sum vunnu 3-0 á Føroyum mánadagin. Úrslitið gjørdist 2-0 til danir, eftir at tað var málleyst í hálvleikinum. Bæði málini vórðu skotin tíðliga í seinna hálvleiki. Í dag er frídagur, og hósdagin er seinasti dysturin í bólkaspælinum á skránni. Tá skulu føroyingar royna at vinna stig móti Svøríki.



## Heldur Cliftonville enn B36

FC Keypmannahavn gjørdi stutta prosess á útivølli ímóti Cliftonville úr Norður-Írlandi. Hóast teir vóru á útivølli, so vunnu teir í FCK heili 4-0 á Cliftonville. Sama kvøld vann Brøndby bara 1-0 á heimavølli ímóti B36. Flestu fótbóltsáhugaðir danir og føroyingar høvdu tí sjálvsagt væntað, at sjónvarpsrásin "3+" fór at vísa returdystin millum B36 og Brøndby, sum verður á ovara vølli í Gundadali í annaðkvøld. Men nei. 3+ hevur valt at vísa dystin millum FC Keypmannahavn og Cliftonville, sjálvt um FCK fer á vøllin við einari 4-0 leiðslu, meðan væl størri spenningur er um úrslitið ímillum B36 og Brøndby. Ilt er at fáa eyga á logikkin í hesum valinum hjá 3+. Brøndby valdi eisini at siga nei til at spæla á grasi á Tórsvølli sjálvan Ólavsøkudag. Teir vilja heldur taka eitt tørn á graslíkinum á ovara vølli hóskvøldið. Tvey ólogisk val, sum fótbóltsáhugaðir føroyingar bara mugu virða.

# Miðvingar gjørdu bart

**Sundabáturin tryggjaði sær FM, men á ólavsøku megnaðu sundamenn einki at gera við Riddaran**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Soleiðis sum tað hevur gingið tríggjar tær seinastu ferðirnar, soleiðis gekk tað eisini á ólavsøku.

Sundabaturin tryggjaði sær FM í kappingini millum 6-mannaførini við monnum, men heldur ikki hesa ferð megnaðu teir á meistarabátinum at gera nakað við Riddaran úr Miðvági.

Tvørabáturin legði bragdliga fyri, og Sundabáturin hevði betri start, enn hann hevur havt undanfarnu ferðirnar. Riddarin var á triðja plássi fyrstu metrarnar, men so fekk hann ferð á, meðan tað eina løtu ikki hilnaðist so væl hjá Sundabátinum.

Riddarin stakk seg framum Tvørabátin og Sundabátin, og eina løtu var munurin ein heil bátslongd.

Í endaspurtinum fekk Sundabáturin rættiliga ferð á, munurin fram til Riddaran minkaði, men tað bar ikki til at taka miðvingar, sum kortini ikki kundu taka FM heitið frá sundamonnum. Hóast FM-sigurin, nívdi tapið manningina umborð á Sundabátinum.

– Vit blivu nummar tvey, og tað er lítið at fegnast um, gjørdi Elmar Joensen á Sundabátinum greitt. Hann vísti á, at teir ikki fingu endaspurtin at rigga.

– Riddarin kom innfyri okkum, og vit mistu tíggju tøk. Tað er ógvuliga vánaligt, men dómararnir eiga størstu skuldina av tí, metti Elmar Joensen, sum annars helt, at burtursæð frá tí gekk róðurin væl hjá teimum.

– At vinna á ólavsøku er altíð gott, men vit mugu so góðtaka hetta sum tað er, ásannaði ein heldur harmur Elmar Joensen.




*Sundabaturin tryggjaði sær FM í kappingini millum 6-mannaførini við monnum, men heldur ikki hesa ferð megnaðu teir á meistarabátinum at gera nakað við Riddaran úr Miðvági*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ólavsøkutíðin:**
1 Riddarin 04:22.12
2 Sundabáturin 04:23.06
3 Tvørabáturin 04:24.07
4 Gongurólvur 04:29.02
5 Strálan 04:29.06
6 Hósvíkingur 04:29.07
7 Lómur 04:30.07
8 Kollfirðingur 04:32.00
9 Rádni 04:32.03
10 Jarnbardur 04:40.24
11 Fortuna 04:41.04
12 Víkingur 04:41.09

**Støðan:**
1 Sundabáturin (FM) 45
2 Riddarin 42
3 Tvørabáturin 38
4 Gongurólvur 25
5 Hósvíkingur 14
6 Rádni 11
7 Lómur 9
8 Strálan 6
9 Fortuna 4
10 Jarnbardur 2
11 Kollfirðingur 0
12 Víkingur 0

# Sílið sera sannførandi

**Røðin millum dreingjabátarnar var nett tann sama á ólavsøku, sum hon var í FM kappingini**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Dreingirnir á Sílinum eru mest sannførandi róðrarmanningin í hesum róðrarárinum.

Fyrr í summar hava dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag vunnið seks sera sannførandi sigrar, og aftur á ólavsøku vunnu dreingirnir á Sílinum so sannførandi sigur, sum tað sjáldan hevur verið vunnið í kappingini millum dreingjabátarnar.

Sílið var fremst eftir startspurtin, á Molanum var Sílið leyst av hinum bátunum, og tá ið bátarnir róðu fram við Molanum, øktist munurin støðugt frá fremsta plássinum og aftur til Havfrúnna úr Vestmanna, sum eina løtu var longri aftuti enn næstfremsta plássið, sum vestmannadreingir hava røkt alt summar.

Junkarin var aftur hesa ferð triður á mál.

Harvið var Sílið sera dyggurmeistari, Havfrúgvin var eins tryggur á silvur plássinum, og Junkarin var tryggur á triðja plássi. Róar Dalsgaard rør við Sílinum og var sjálvsagt fegin.

– Hetta er ótrúliga gott og vert hvørja krónu. Sjey á rað er óført, og man hevur ikki vunnið FM uttan at vinna á ólavsøku, segði Róar Dalsgaard, tá hann var komin upp á land.

– Vit hava vant so nógv, og í dag vildu vit gera alt fyri at vinna, so tað koyrdi bara allan vegin hjá okkum, sigur Róar Dalsgaard, sum var við at vinna ein ógvuliga sannførandi róður.

– Tað var gott, ótrúliga gott, næstan bara hygg, segði Róar Dalsgaard, sum skýrdi ólavsøkuróðurin at vera ein hyggeróður, sum hann tók til.






*– Sjey á rað er ófórt, og man hevur ikki vunnið FM uttan at vinna á ólavsøku, sigur Róar Dalsgaard umborð á Sílinum, sum eisini vann Útvarpssteypið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ólavsøkutíðin:**
1 Sílið 04:33.15
2 Havfrúgvin 04:39.08
3 Junkarin 04:40.06
4 Teistin 04:44.12
5 Strípan 04:45.09
6 Tjaldrið 04:45.13
7 Katla 04:46.06
8 Blikur 04:47.13
9 Jallurin 04:49.15
10 Tambar 05:02.01

**Støðan:**
1 Sílið (FM) 49
2 Havfrúgvin 41
3 Junkarin 36
4 Tjaldrið 25
5 Strípan 18
6 Teistin 17
7 Katla 8
8 Blikur 1
9 Tambar 1
10 Jallurin 0